Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingskvinna

Svarari: Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í tilfeingis- og vinnumálum

Evni: Landbúnaðarstuðul

Spurningar:

1. Eru ætlanir um at broyta játtanarslagið frá at eita stuðul til lógarbundin játtan í sambandi við játtanina til landbúnaðin?
2. Er ætlanin ar hækka játtanina til landbúnaðarstuðul?

Viðmerkingar:

Á Búnaðarstevnuni um vikuskiftið varð nomið við fleiri viðurskifti, sum kunnu betra um landbúnaðin sum vinnu. Tað hevði m.a. givið bóndum tryggari viðurskifti, um játtanarslagið, sum í dag eitur stuðul, verður broytt til lógarbundna játtan. Hetta hevði givið teimum, sum starvast í vinnuni, munandi tryggari viðurskifti, serliga tá ið atlit skal takast til veðurlagið í sambandi við góðskuna á grøðini.

Samanbera vit landbúnaðin við landbúnaðin í okkara grannalondum, sæst stórur munur á, hvat viðvíkur stuðli. Á Búnaðarstevnuni komu nøkur áhugaverd hagtøl fram, sum vísa, at okkara landbúnaðarvinna langt frá er kappingarfør. Sambært tølum frá stjóranum á Búnaðarstovuni, so játta:

Írland	2.735 kr. pr. íbúgva
Finnland	2.230 kr. pr. íbúgva
Noreg	3.190 kr. pr. íbúgva
Ísland	2.905 kr. pr. íbúgva

meðan Føroyar veita 364 kr. pr. íbúgva.

Hetta ger tað ógvuliga trupult hjá føroysku landbúnaðarvinnuni at kappast við landbúnaðarvørur úr øðrum londum, har stuðulin er so høgur. Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 18. februar 2026

Annika Olsen